# Mortan í starvsvenjing á Sosialinum



Mortan Seyer Vistrup við telduna í fotorúminum á Sosialinum. Honum hevur dámað væl at verið í starvsvenjing á Sosialinum

Mynd: Jens Kristian Vang

STARVSVENJING
*Eirikur Lindenskov*

Seinastu 14 dagarnar hevur Mortan Seyer Vistrup verið í starvsvenjing á Sosialinum.

Mortan gongurí 10. flokki í Eysturskúlanum í Havn.

– Mær hevur dámað væl á Sosialinum, og eg kundi væl hugsað mær verði blaðmaður, sigur Mortan.

Mortan hevur upplivað mangt og hvat, hann hevur verið saman við blaðfólki og myndafólki og hevur eitt nú fyri fyrstu ferð verið í Løgtinginum og hitt politikarar. Hann var eisini við til samkomuna í Løgtinginum, tá málningurin hjá Ingálvi av Reyni varð avdúkaður.

Mándagin byrjar so vanliga skúlagongdin aftur – men Mortan kundi væl hugsað sær at verið á Sosialinum í tvær vikur aftur.

# Kanska í læru sum bilmekanikari



*Bjørn í ferð við at pussa ein bil. Hann er í starvsvening sum bilmekanikari hjá Reyni Service*

STARVSVENJING
*Mortan Seyer Vistrup0*

Bjørn Nolsoe Reinert er í starvsvenjing hjá Reyni Service í Hoyvík. Bjørn er sera glaður fyri vera har.

– Eg havi altíð verið sera áhugavur í bilum og motorum. Her uppi sleppi eg at umvæla alt møguligt í bilunum, og onkutíð skal eg eisini vaska bilarnar. Eg ætli mær kanska at vera bilmekanikari, tá ið eg veri stórur, tí at eg haldi, at tað er eitt ógvuliga spennandi arbeiði.

Á Reyni Service er ein matstova, so tá ið Bjørn hevur matarsteðg, kann hann bara fara í matstovuna at fáa sær ein bita.

## VIÐMERKINGAR

# Sláið kalt vatn í blóðið!

**Tórbjørn Jacobsen**



Sjálvstýrissamgongan situr á fimta ári. Fiskiskapurin er góður. Prísurin tað sama. Onkrir sektorar í vinnuni eru tó í einum aldudali, m.a. ali- & rækjuvinnan, men soleiðis sum kynið er vorið í kapitalismuni, ella rættari marknaðarbúskapinum, so man vend fara at koma í sum frálíður. Frælsi búskapurin fylgir støddfrøðiligu sinus-kurvunum ella sum klaksvík-ingurin segði: Streymtalvuni hjá Fisher Heinesen. Tí ræður um at medda seg inn á miðásin, hvat ið samfelagsútreiðslunum viðvíkur, annars halda brøkurnar ikki.

Í alra bestu tíðum hava føroyingar valt at liva, í súsi og dúsi, av síni egnu uppdrift og 600 milliónum av donskum náðismolum. Ferðin er stór. Onkur heldur at symptomini eru tey somu, sum fram ímóti dystarenda í 92. Men hetta er ikki heilt rætt. Sitandi samgonga hevur steðgað ringastu heljarfaktorunum. Veðhalds, - stuðuls, - & almenni rakstrarlánspolitikkurin er søga. Hildið verður fast um positivan javnað í landsins húsarhaldskassa. Leiðslurnar í fíggjarstovnum landsins eru skilabetri, og harafturat man somikið av kvøkki framvegis sita í hvørjum einstøkum, at veruligt hóttafall er ikki í væntu.

Og ímeðan basúnirnar frá andstøðuni skapa jarðarferðarstemning og gráturin og tannagríslið fara um teigar og tún, tá standa somu menn í ymsum høpum, líka so ábyrgdarleysir, og blaða milliardaíløgur og nýggjan rakstur fram í ein nýggjan dag. Her hongur lítið saman. Neyðars rullumaður vesturi á Mykinesgrunninum, fyrstahondsvitnið til lívsins veruleika um hesar leiðir, ið sær at ein og ein toskur skal goggast inn um lúnningina fyri at gjalda alt hetta galimatiasi, sum eisini landsins kosnu menn nú einaferð kunna finna uppá at lira av sær.

Tað er kanska troyttandi at hoyra hesar ávaringarnar uppí saman aftur, men politikarnir mega til eina og hvørja tíð læra seg, at teir eiga ikki rættin at skuldarbinda ókomin ættarlið, og mega ómøguligt hanga ein langan kreditorlista um hálsin á teimum sum einaferð skula skipa sær sína egnu sam- & framtíð. Kreditfelagslánini vóru eisini ein partur av tí totala føroyska kollapsinum. Tað sigst, at tað hongur ein føroysk mynd inni á stjóraskrivstovuni í Nykredit. Av eini kiosk. Donsku kreditfeløgini stóðu til at spreingjast av pengum. Grýttu um seg til høgru og vinstru. Ein føroyingur bað um at fáa tvær milliónir til láns, til ein virkisbygning á einum bryggjuøki. Gamaní. Her var onki óført. Fá ár seinri skræðnaði tjaldið. Peningurin guvaður burtur. Nevndin hjá Nykredit kom til Føroya fyri at meta um realvirðini aftanvert lánsveitingarnar. Og av tí at teir høvdu lænt einari kiosk tvinnar milliónir, og sum nú hevði eitt metingarvirðið á kr. 7.000,- og hetta helst var hitt grellasta dømið um skilaloysi hjá fíggjarstovninum, hongur hendan myndin av kioskini og nevndini sum ein ræðsluávaring á bróstinum hjá stjóranum, soleiðis at hetta ongantíð má henda aftur. Hevði kanska verið eitt hugskot, at fíggjarnevnd løgtingsins bað um eitt tvítak av hesi myndini, sum kundi sligið kalt vatn í blóði á nevndarlimunum, nú tá ið eykajáttanir, fíggjarnevndarskjøl o.s.v. fara at bólta inn ígjøgnum apoteksdyrnar í Niels Finsensgøtu.

Í seinastu Fregnum verður Mahatma Gandhi endurgivin soleiðis: "Tað er ivaleyst av tilfeingi í heiminum, til tørvin hjá øllum, men ikki til egingirndina hjá øllum."

Sum fráboðað í heyst, er landsstýrið longu farið í holt við fyrireikingarnar av fíggjarlógini fyri árið 2004. Meirilutin í fíggjarnevndini er ein sjálvsagdur partur av hesi gongd í byrjanini. Áðrenn spektrið verður breiðkað. Hesin ótraditionelli meirilutin, sum fyri onkrum líktist einum kommandobólkið, eini autonomari enklavu, ella eini paramiliterari fraktión, í tíðini fyri jól, kom kanska við neyðugu ávaringini um, at nú skal táttast í, skal ein sjálvberandi búskapur hava ein tjans, soleiðis sum málsetningurin er hjá hesi samgonguni.

Nú ræður um at halda fast. Ein nominellur útreiðslusteðgur hevði kanska verið rætta sloganið nú ongin væntar at inntøkurnar fara at vaksa. Hetta hevði eisini lagt trýst á almennu skipanina, landsstýrismenninar, soleiðis at neyðugu rationaliseringarnar komu av sær sjálvum. Best var um løgmaður, varaløgmaður og fíggjarmálaráðharrin komu fram í dagin, og søgdu landsins borgarum frá, at hógv og skynsemi nú er medisinið, ið skal til, skulla búskaparligu veðurlíkindini vera sum frægast frameftir. At øll hesi nýkomnu áhugaprosjektini við tunnlum, fótbóltshallum o.s.v. mega vera ein partur av teirri raðfesting, sum gjørd er sambært samfelagsins eginuppdrift. Alt annað er vitloysið. Eitt nýtt økonomiskt ragnarrok. Samgongupolitikkur er ikki bara ein spurningur um atkvøður. Um popularitet. Um at rista breiðar álir av annans herðum. Um at leggja ógoldnar rokningar eftir seg. Men heldur ein spurningur um at lata komandi ættarliðum samfelagið í varveitslu í so frægum standi sum gjørligt. Hetta líkamikið um onkrar næsar mega brotna á leiðini.

Allir føroyingar eru samdir um, at vøksturin í almennu útreiðslunum hevur verið alt ov stórur hesi seinastu árini. Tí er alneyðugt at rationaliseringsekspertar, líkamikið um teir eru føroyingar, týskarar ella japanesar sleppa inn á almennu røkurnar fyri at meta um, um produktivitetturin stendur mát við aktuellu peninginanýstluna. Eitt verk sum ikki stendur í eini áhaldandi kappingarstøðu hevur sambært natúrulóg lyndi til at bólgna av sær sjálvum. Glarið á ístrinum harðnar, og onki rínur á tí. Her mega aðrir bollar drýpast í súpanarpottin skal rullumaðurin vesturi á Mykinesgrunninum hava ein livandi tjans fyri bara at halda tørn.

Ein illkynja sjúka, sum hevur riðið føroyska búskaparpolitikkinum, sum ein marra í nógv ár, eru hesar vælsignaðu eykajáttaninar, sum landstýrismenn koma rennandi við í tíð og ótíð. Teir hava ilt við at skilja, at fíggjarkarmurin, sum fólksins umboðsmenn á løgtingi nú einaferð hava samtykt sum støðið í búskaparligu útinningini í samfelagnum, er endaligi karmurin, sum teir hava treytaleysa skyldu at halda og virða. Hereftir má og skal tað vera eitt krav, at eykajáttanarlógirnar vera útreiðsluneutralar. Megna landsstýrismenninir ikki at disponera yvir tillutaða gjaldførinum, megna teir ikki at fáa sínar soldátar úti á markini, at virka sambært hesum, tá er bert eittans at gera: At landsstýrismaðurin stingur í sekkin og fer til hús. Tá er hann bara ikki skikkaður til at umsita sítt málsøkið. Á íløgusíðuni kann tað als ikki góðtakast at arbeiðstakarar nú sita og avgera hvussu fólksins játtanarmyndugleikar skula sita og taka sínar avgerðir. Landssjúkrahúsið er eitt talandi dømið um, at disiplinin í hagreiðingini av almennum pengum ikki er í lagi.

Hitti fyrrverandi landsstýrismannin í fíggjarmálum, Finnboga Ísakson, inni á høvuðsjarnbreytastøðini í Keypmannahavn nú ein dagin. Tosaðu um mangt og mikið. Eisini um føroyska búskapin. Hugsi at vit komu ásamt um, at skilabesta loysnin mundi vera, at útreiðslustøðið, á leið, varð lagt eftir einum meðalári í búskapinum. Soleiðis at sveiggini ikki gjørdust alt ov krøpp. Báðar vegir. Tað munna tey flestu vera samd í.

Skula vit hugsa um ein sjálvberandi búskap, í hesum valskeiðnum, so má meiri disiplinur koma í búskapar- & fíggjarpolitikkin. Og sum tað er fráboðað fleiri ferðir í politiska høpinum, so skal útinnandi valdið ikki vænta, at fíggjarnevnd og løgting, heldur seg til annað enn tað sum Føroya Løgting samtykti, tá ið løgtingsfíggjarlógin við stórum meiriluta varð atkvødd ígjøgnum fyri jól.

Annars er hesin spurningurin um sjálvberandi búskap ein reinur bagatellur. Snýr seg í stuttum bara um at trýsta á nakrar vitalar knøttar í samfelagnum, so er tann sakin úti av verðini. Harvið snýr politiska frælsið Føroya seg bara um ein greiðan politiskan vilja, ið higartil hevur verið ið so kámur á breddanum. Kunna formenninir í teimum báðum stóru samgonguflokkunum semjast um hesi meginmál, tá er teinurin stuttur fram í republikkina.

Alt stendir og fellir við viljanum hjá sjálvstýrisrørsluni í Føroyum. Um tað røkkur ella støkkur. Nú spyrst um tað livst.

Vikuskifti
Nr. 42 • leygardagur • 1. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo



Deyðamessa fyri tjóðskaparromantikki

Bergur Hansen skrivar um tjóðskaparmentan

Lesið síðu 6 & 7



# Á flogi móti vestri

Sveimandi fara vit gjøgnum lívið. Soleiðis meira ella minni. Summi eru tó so jarðbundin, at tey lætta sær ongantíð rættiliga á, meðan onnur eru sum havhesturin og altíð á flogi. Dáma best, tá buldraligt er rundanum

SVEIMANDI
*Edvard Joensen*

Hann strýkur tætt fram við eggini. Havhesturin. Er bara akkurát leysur av landi, men stýrir so frá aftur og sveimar í fríum lofti. Letur uppdriftina taka seg og ger eitt kast eftir løgg. Veingirnir púra stívir alla tíðina. Rørir teir ikki, men fer við nógvari ferð um næsta nasan og er burtur.

Út í stóru verð at kanna, hvat har er at síggja. Berandi boð um alt tað, hann sá á vegnum. Leggur einki eftir seg. Uttan spurningin um, hvar hann mundi fara?

Eins og vindurin er hann. Vit vita ikki, hvaðani hann kemur. Vit kenna hann, meðan hann er her. Og vit missa hann burtur beinanveg, hann er farin. Standa eftir og gána. Vita einki.

Men vit vita, at handan ærin, sum liggur inni á sløttum, hon etur. Hon verður verandi her alt lívið. Hon hugsar ikki um annað enn at eta. Einaferð, tá brundarnir eru komnir útaftur, fer hon á ein tilvildarligan fund, og so melur alt bara víðari. Hon fær eina tilmáldað tíð. Gongur alt eftir føstu ætlanini, livir hon í eini sjey ár, um hon er soleiðis miðal. Eru lombini betri enn so, kann hon skava sær eitt ár afturat. Kanska verður tað kortini styttri. Vit vita ikki, men hava ætlaninar.

Soleiðis fer hennara lív. Hon etur stráðini. Veit, at tey eru har. Er trygg. Fær upp í munnin og krevur so einki meira.

Annar fýrurin er havhesturin. Blakar seg út í tað óvissa, men er, uttan sjálvur at vita tað, minst líka tryggur sum ærin. Ikki fellur spurvur til jarðar, uttan vilji er til tess, vita vit. So mikið betur er havhesturin vardur.

Og her sitir tú so. Hyggur út fyri eggina. Kennir teg sum havhestin, ið sveimar ein stuttan favn frá eggini. Klárar, um hann vil, at tríva í tey ytstu, veiku stráini, um illa skuldi viljað til. Ein veik trygd, um tú kølnar um føturnar og ikki torir at fylgja tíni ætlan og sannføring.

Tú velur at liva sum ærin. Á tryggari grund. Her hendir einki óvæntað. Alt gongur eftir ætlan. Eitt lamb á hvørjum ári, og tað er so tað.

Tíbetur eru ikki øll sum ærin. Tey velja, sum havhesturin, at royna flogið. Tveita seg út í luftina og sveima við uppgangandi vindunum fram við næsta nasanum. Fara framvið og tekkja nýggjan heim hinumegin. Undir er havið. Skiftandi. Bæði í skapi og liti. Ljóst og slætt viðhvørt. So buldrugt og døkt. Hvat har er undir, vita vit heldur ikki.

Vit royna at halda okkum yvir. Hava bert avmálda tíð á flogi. Tað vita vit.

Tað snýr seg um at tora at liva og so heldur missa fótafestið eina løtu. Og tað er sjálvan ov seint at byrja. Vit hava ivaleyst ligið nóg leingi á biti og jótrað upp í saman. Svølgt og klíggjað uppaftur. Etið nøkur stráð afturat. Og so sama veg aftur.

Men vit sóu einki. Vildu einki síggja. Upplivdu einki. Øvundaðu havhestinum, sum streyk so lættur framvið. Men vildu heldur ikki viðganga tað. Løgdu hann undir at vera ábyrgdarleysan. Hann skuldi heldur hugsað um at lívbjarga sær og sínum virðiliga!

Havhesturin fekk stutta tíð. Hann varð tikin á flogi við stong, og høvdið snarað av. Inni í haganum stóð ærin. Gløddi dølsk at manninum á eggini og fór aftur at eta. Hugdi niður í vøllin og hevði mold millum oyruni.

Meðan havhesturin fór á longri ferð. Elti sólina í ein vestan. Ein nasa. Og tveir. Har vóru fleiri afturum. Hann hevði flogið um so nógvar ta stuttu tíð, hann sveimaði. Men hann hevði sæð teir og landið hinumegin eisini. Tað hevði ærin ikki.